
# BARNA-SIÐAN


## VEITST tú

**hvussu skjótt hesi dýr kunnu renna? (tá ið tey renna av tí harðasta)**




**LOYSNIN á uppgávuni á næstseinastu barnasíðu:**

**Tey trý tølini, sum skuldu leggjast saman**





## UPPGÁVA til tey smærru børnini:

**Hvat er á hesi myndini?**



Set puslispælið saman — og send loysnina til Sosialin (barnasíðan), box 76, Tórshavn innan næsta leygardag.

Vit kasta lut um ein vinning.




# LOYNIHELLIÐ

## eftir *J. M. Neale*

### Euthymius og spøkilsið

**7. partur:**

Tá ið hann vaknaði morgunin eftir, skein sólin longu. — Og eftir tann dag hevði ikki spøkt í hasum hellinum! — Tær somu søgurnar ganga annars um hetta hellið, sum vit sita í, sum um tað, ið Euthymius stóð sína trúar-roynd í«.

Cyrilla førkaði seg tættari til móður sína.

»Vit vóna, at vit verða spard fyri tílíkar hendingar!« læt í Basiliusi.

»Hví tað, pápi?« spurdi Filippus. »Hevði eg bara verið har! — So skuldi spøkilsið fingið av at vita«! — »Ella fekst tú, sonur mín! — Ja, Pambo, so hugsi eg, at tíðin er farin. Her er talvan. Royn og fá sent hana til Ombi!«

Pambo las skundisliga brævið ígjøgnum.

»Flavius Turbo til vin sín Markus, heilsan og signing! Síðani tú fórt frá okkum hevur **alt** vent sær til tað góða. Høvdu vit kunnað knýtt **samband** av nýggjum, so skuldi eg greitt tær frá nógvum, sum tú hevði undrast **um!** — Men tað má bíða, til vit hittast aftur. Ver vísur í, at vit eru góð við teg, sum altíð. Heilsa vinum okkara í Ombi, serliga Omfyrius, **Pambo** og Frumentius, hjartaliga frá okkum! Vit vóna, at Frumentius ikki hevur fingið nakað mein av tí harðveðrinum, sum vit frættu hevur verið í **Zericah.** Okkara serliga kvøða til tín, **sum** er besti vinur okkara. Alla tíðina spyrja **vit** okkum sjálvi, um vit **tora at líta á,** at vit nakrantíð hittast aftur? Til seinast tær blíðastu heilsur, eisini frá konu mínari og børnum mínum«.

»Hvørji eru hasi fólkini, sum tú letur heilsa? — Pambo? — havi eg ein navna í Ombi?«

Basilius flenti. — »Nei, eg kenni ongan av teimum, Flavius Turbo er dulnevni mítt, og Markus er dulnevni hjá presbytaranum. Nøvnini, sum standa saman vð navninum á Pambo, eru bara sett har, so at navnið Pambo ikki skal vera so eyðsýnt. Og Pambo — ja, tað er tú! — Hygg nú her!«

Basilius legði pappírspettið við holunum oman á vokstalvuna. — Í holunum á arkinum lósu tey tá hesi orðini: »Alt samband um Pambo í Zericah, sum vit tora at líta á«.

»Frálíkt!« rópti Pambo hugtikin.

»Í hasum líkinum kunnu tit órødd senda brævið! — men nú noyðist eg at fara. — Um so er, at nakað illgrunavert fer fram í gróðrarblettinum, so skal eg royna at lata tykkum frætta tað. Annars komið eg aftur um átta dagar við útgerð. Og so leingi: Gud veri við tykkum!«

Basilius takkaði honum einaferð enn, og so hvarv Pambo í náttarmyrkrinum.

Tey løgdu seg at sova. Faðirin, móðirin og báðir dreingirnir býttu náttarvaktina ímillum sín. Tí eldurin máttí ikki slókna. Trælurin helt vakt hjá kamelunum.

### Fremmandamaðurin

**8. partur:**

Tvær vikur gingu. Basilius og tey høvdu gjørt sær tað rættiliga hugnaligt í hellinum. Difilus hevði selt kamelarnar í hinum gróðrarblettinum og fingið nokk so góðan prís fyri teir, at hann helt ikki, at nakar har hevði givið sær far um, hvør hann var, ella hvaðani hann kom. Øll høvdu tey nærum vant seg við teirra nýggju tilveru. Nú bíðaðu tey spent eftir Pambo, og helst eftir teim tíðindum, sum hann hevði at bera.

Tey sótu júst og fingu sær nátturða, tá ið tey hoyrdu ljóð niðan úr gjónni, sum gekk niðan til hellið. Og um eina løtu var Pambo har. Hann hevði nógv at dragsa.

»Skundið tykkum, far ein oman á handa hjallan, og fá alt niðan áðrenn tað verður myrkt!« rópti hann, tá ið tey høvdu heilsast.

So við og við varð alt, sum Pambo hevði havt við sær á einum esli, borið inn í hellið.

»Hvørji tíðindi úr Ombi?«

Framhald